Fylgiskjal 9

LM-070/2020

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

Akt 24 Høyringssvar frá BLF

10. februar 2020

UMMÆLISSKRIV

viðvíkjandi

uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn og løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. (Rætting viðvíkjandi eftirløn uttanfyri Eftirlønarlógina, strikað prísjavning av upphæddum og ymiskar nágreiningar), og

uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin) (Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar).

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til omanfyrinevndu lógaruppskot.

BLF skal gera viðmerkingar til tann partin av uppskotunum sum snýr seg um at hækka lógarkravdu pensjónsuppsparingina yvir trý ár frá 12 prosentum í 2026 til 15 prosent í 2029.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var lækkingin úr 15 prosentum niður í 12 prosent í nógvar mátar óheppin. BLF skal viðmerkja, at hesar broytingarnar vórðu partur av eini størri pensjónsnýskipan, har fleiri broytingar vórðu framdar samstundis, og tá vístu greiningarnar, at samanumtikið gjørdist fíggjarliga haldførið hjá landinum betri. Harafturímóti eru ongar greiningar við fyriliggjandi uppskoti sum vísa, at tørvur er á at hækka lógarkravdu pensjónsuppsparingina upp í 15 prosent.

Í viðmerkingunum stendur eisini, at lækkingin av bundnu uppsparingini kann hava týdning fyri fíggjarstøðuna hjá pensjónistum. Her skal BLF viðmerkja, at fleiri aðrar lógarbroytingar eru eisini framdar, sum hava ávirkað fíggjarstøðuna hjá pensjónistum til tað betra. Her kann nevnast, at inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin er hækkað úr 1,75 prosent í 3 prosent, sum gevur munandi hægri útgjald. Eisini er mótrokningin í fólkapensjónini lækkað í 2017 og aftur í 2020. Harumframt hava pensjónistar fingið ein serligan frádrátt í skattinum.

Í viðmerkingunum verður víst á, at skatturin frá pensjónsinngjøldum er bulurin í fíggingini av eldraøkinum, og at lækkingin av bundnu uppsparingini hevur við sær, at kommunurnar fáa væl minni til rakstur av eldraøkinum enn teimum varð lovað. BLF skal viðmerkja, at ásetingin av

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

bundnu uppsparingini til eftirløn eigur ikki at taka atlit til, hvørjar skattainntøkur frá pensjónsinngjøldum kommunurnar hava tørv á ella hava fingið lovað.

Tá broytingar vórðu gjørdar í fólkapensjónini, soleiðis at pensjónistar frá 1. januar 2020 fingu meira at liva fyri, mælti BLF til at lækka uppsparingarkravið, soleiðis at familjurnar hava møguleika at tillaga síni eftirlønarviðurskifti samsvarandi. BLF metir framvegis, at tørvur er á at lækka bundnu uppsparingina soleiðis, at familjur hava betri møguleika at leggja síni fíggjarligu viðurskifti til rættis, eitt nú við at rinda skuld niður ístaðin fyri at rinda til egna pensjónsuppsparing.

At enda verður víst á, at ov nógvar broytingar á pensjónsøkinum, samanumtikið kunnu minka um álitið á skipanina.

Vinarliga

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya